# Valúrslitið kann fara púra av leið

**Veljarakanningin, sum varð kunngjørd í Sosialinum um dagarnar, hevur skapt spenning um lagnuna hjá ymsu flokkunum í einstøku valdømunum og nógvar spekulatiónir um, hvørjir tinglimir fara at liggja eftir á. Tað, sum verri er, er, at kanningin vísir, at tað skal lítið til, áðrenn vit fáa eitt tingmannabýti, sum er ímóti øllum tí, ið ætlanin er við valskipan, sum skal tryggja lutfalsliga umboðan. Valskipanin eigur at fáa bráfeingis rættingar sum skjótast**

VELJARAKANNING
*Jógvan Mørkøre*



Stóru andstøðuflokkarnir kláraðu seg frægast. Sambandsflokkurin stóð til at fáa 10 tinglimir, allir valdømisvaldir, Javnaðarflokkurin 8, somuleiðis allir valdømisvaldir. Javnaðarflokkurin er tann, sum stendur til at fáa bíligastu tinglimirnar, t.e. fægstar atkvøður fyri hvønn valdan tinglim.

### Gott hundrað atkvøður fluttar, so er vent í holuni

Tað, sum ikki hevur verið frammi, er, at lítið skal til, so verður úrslitið hitt øvugta millum hesar flokkar. Ímynda vit okkum, at kanningin var valið, so skuldu bert fáar atkvøður flytast millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin í Vágunum og Suðuroy, so fekk Javnaðarflokkurin 10 og Sambandsflokkurin 8 valdømisvaldar. Fimtan fluttar atkvøður frá Sambandsflokkinum til Javnaðarflokkin, so fingu flokkarnir hvør sín av teimum báðum valdømisvaldu har vesturi í staðin fyri, at Sambandsflokkurin fer við báðum sum í kanningini. Nakað tað sama ger seg galdandi í Suðuroy, har 92 atkvøður skulu flytast í døminum frá kanningini, so fær Javnaðarflokkurin 3 í staðin fyri 2 av teimum 4 valdømisvaldu í oynni, og Sambandsflokkurin má taka til takkar við bert 1 í staðin fyri 2 sum í kanningini.

Tað er so tað, tað er. Tað, sum ger hetta taldømi áhugavert, er, at hóast tað lagar seg so øvugt fyri Sambandsflokkin, so fær hann ikki lut í býtinum av teimum 5 eykavaldu, um vit rokna víðari eftir leistinum í vallógini. Úrslitið verður, at Sambandsflokkurin við gott 28 %'um fær bert 8 tinglimir tilsamans, meðan Javnaðarflokkurin við næstan 6 % minni í veljaraundirtøku fær 10 tinglimir.

### Endamálið við valskipan sum okkara

Valskipan sum tann, vit hava, er valskipan, sum fyrst og fremst skal tryggja lutfalsliga umboðan, so flokkarnir, ið fáa valt uppstillaðar limir á ting, fáa eina umboðan, ið svarar til undirtøkuna millum veljararnar. Endamálið er ikki bert at tryggja rættvísa umboðan, men líka nógv at ein flokkur, sum gongur fram á einum vali, eisini fær øktar møguleikar at fremja sín politikk. Annars gevur tað púrt onga meining at tosa um fólksins dóm og fólksins vilja.

Sum er, hava vit eina skipan, har tað er komið fyri, at flokkur, sum er farin fram í veljaraundirtøku, hevur mist burtur av síni tingumboðan. Og vit skulu ikki longur aftur enn til løgtingsvalið í '98, tá Fólkaflokkurin fekk sama tingmannatal, sum Tjóðveldisflokkurin, hóast 2,5 % á muni í veljarundirtøku. Báðir fingu 8 tinglimir, Fólkaflokkurin 21,3 % og Tjóðveldisflokkurin 23,8 %.

Tá slíkt kemur fyri, verður tosað eitt sindur um at broyta skipanina, men skjótt er tað gloymt, og spurningurin, um vit skulu hava eitt valdømi í staðin fyri sjey sum nú, sleppur at skúgva meira átrokandi spurningar til viks.

At tað er neyðugt at gera nakað við henda spurning, vísir dømið við veljarakanningini sum støði til fulnar. Eitt valúrslit kann gerast púra rangvørt.

### Hvat er galið?

Tá ið vallógin seinast fekk eina yvirháling í 1978, varð talið á møguligum eykavaldum minkað úr 10 niður í 5. Samstundis vórðu valdømisvaldu øðrvísi býtt millum valdømini, og samlaða talið varð økt úr 20 upp í 27. Talan varð um eina justering orsakað av demografisku broytingum. T.d. fekk Suðurstreym 8 við lógarbroytingini í mun til 4, sum valdømið hevði havt í eitt mannaminni.

Men at minka talið av eykavaldum, samstundis sum hildið varð fast við gamla uppgerðarháttin, eisini nevnt d'Hondt-hátturin, varð einki heppið val. Alla aðrastaðni, har roynt verður at hava lutfalsval til tjóðarting, er Sainte-Lague-hátturin komin í staðin fyri d'Hondt. Munurin liggur í, at við d'Hondt-háttinum, sum vit enn brúka, býta vit í valdøminum atkvøðutalið hjá einstøku flokkunum við 1,2,3,4 osfr. Sainte-Lague-hátturin - ella staktalsháttturin - brúkar staktøl, 1,3,5 osfr. at býta við. Tá ið valdømisvaldu tinglimirnir skulu finnast í valdøminum, fær tann flokkur, ið hevur flestar atkvøður fyrst valda tinglimin. Síðani verður atkvøðutalið býtt við 2 í d'Hondt og við 3 í Sainte-Lague-háttinum, og hugt verður eftir, um talið framvegis er størri enn tey óbýttu hjá kappingarneytunum. Er tað tað, fær flokkurin eisini næst valda, og síðani verður atkvøðutalið býtt við 3 í d'Hondt-skipanini og við 5 í Sainte-Lague. Stórir flokkar fáa soleiðis meira burtur úr d'Hondt-skipanini, samstundis sum hon krevur, at eitt størri tal av eykavaldum tinglimum má til fyri at javna teir mismunir, ið uppstanda, og til tess at tryggja, at talan er um lutfalsval í landinum sum heild.

Okkara valskipan er óheppin, tí at vit hava framvegis d'Hondt-háttin at býta valdømisvaldu við, samstundis sum vit hava eitt ov lítið tal av eykavaldum til at javna teir mismunir, ið verða fyri landið sum heild.

Við tilhugsaða døminum frá kanningini ber til at lýsa, hvussu langt av leið, vit í grundini eru. Skuldu teir ójavnar beinast burtur, sum uppstanda, tá ið ein flokkur við bert 22,5 % av atkvøðunum kann fáa 10 valdømisvaldar, so hevði tað kravt 18 eykavaldar tinglimir í staðin fyri bert 5, rokna vit eykavald eftir galdandi lóg, men taka loftið burtur. Samlaða tingmannatalið hevði tá blivið 45 í staðin fyri 32, um rætta lutfallið skuldi tryggjast.

### Tiltrongd tiltøk

At taka loftið fyri eykavald burtur er neyvan loysn, ið vinnur undirtøku. Hvørki millum manna ella í Løgtinginum. Men tað ber til at fremja ábøtur, so tað slepst undan teimum mest meiningsleysu sveiggjunum. Stýrisskipanarlógin loyvir upp í 33 tinglimum. Og letur tað so yvir til løgtingið at skipa fyri rest við løgtingsvallóg. So har er t.d. møguleiki at økja talið av eykavaldum úr 5 upp í 6 og samstundis fara frá d'Hondt-háttinum til Sainte-Lague.

Royna vit henda leist upp á tilhugsaða dømið frá veljarakanningini, so fáa vit eitt øðrvísi tingmannabýti. Sambandsflokkurin hevði fingið 10 og Javnaðarflokkurin 9, meðan hinir høvdu fingið tað sama. Heilt rættvíst hevði tað ikki blivið, men ringastu skeivleikarnir høvdu verið tiknir burtur.

### Nú vit eru í gongd: Valdømi og lutfalsval

At vit hava lutfalsval merkir ikki bert, at vit skulu hava rætt lutfall millum flokkar, men somuleiðis millum valdømini.

Veljarabýtið ímillum valdømini er ikki tað sama sum í 1978. Skuldu teir 27 valdømisvaldu tinglimirnir verið býttir av nýggjum, so samsvar var ímillum veljaratal og tingmannatal í hvørjum valdømi sær, so hevði býtið verið hetta: Sí talvu 3 niðast á síðuni.

Hvussu realistiskt tað er at fremja hetta, er meira ivasamt. Tá ið vallógin varð broytt í 1978, vísti tað seg at bera til at økja talið í einkultu valdømunum, men at minka tað í valdømi bar ikki til í Løgtinginum.

So skal hetta býti rættast til uttan at økja tingmannatalið, verður tað ivaleyst neyðugt at leggja spurningin til serstaka nevnd uttan fyri tingið at avgera.

Talva 1: Úrslit frá veljarakanning og úrslit, um mandatbýti við fáum atkvøðum fluttar í Vága og Suðuroyar valdømum

| | Kanning januar 2004 | | | | Broytt býti - 15 atkvøður fluttar í Vágum og 92 í Suðuroy | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | %-býti | Valdømisvald | Eykavald | Vald tils. | %-býti | Valdømisvald | Eykavald | Vald tils. |
| A. Fólkaflokkurin | 19,8 | 5 | 1 | 6 | 19,8 | 5 | 1 | 6 |
| B. Sambandsflokkurin | 28,5 | 10 | 0 | 10 | 28,2 | 8 | 0 | 10 |
| C. Javnaðarflokkurin | 22,1 | 8 | 0 | 8 | 22,5 | 10 | 0 | 8 |
| D. Sjálvstýrisflokkurin | 3,9 | 0 | 1 | 1 | 3,9 | 0 | 1 | 1 |
| E. Tjóðveldisflokkurin | 19,4 | 4 | 2 | 6 | 19,4 | 4 | 2 | 6 |
| H. Miðflokkurin | 4,1 | 0 | 1 | 1 | 4,1 | 0 | 1 | 1 |
| K. Hin Stuttligi Flokkurin | 2,1 | 0 | 0 | 0 | 2,1 | 0 | 0 | 0 |
| | 100,0 | 27 | 5 | 32 | 100,0 | 27 | 5 | 32 |

Talva 2: Somu fortreytir sum í talvu 1, men uttan loft á talinum av valdømisvaldum

| | Kanning januar 2004 | | | | Broytt býti sum áður -við neyðuga talinum av eykaumboðum | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | %-býti | Valdømisvald | Eykavald | Vald tils. | %-býti | Valdømisvald | Eykavald | Vald tils. |
| A. Fólkaflokkurin | 19,8 | 5 | 1 | 6 | 19,8 | 5 | 4 | 9 |
| B. Sambandsflokkurin | 28,5 | 10 | 0 | 10 | 28,2 | 8 | 5 | 13 |
| C. Javnaðarflokkurin | 22,1 | 8 | 0 | 8 | 22,5 | 10 | 0 | 10 |
| D. Sjálvstýrisflokkurin | 3,9 | 0 | 1 | 1 | 3,9 | 0 | 2 | 2 |
| E. Tjóðveldisflokkurin | 19,4 | 4 | 2 | 6 | 19,4 | 4 | 5 | 9 |
| H. Miðflokkurin | 4,1 | 0 | 1 | 1 | 4,1 | 0 | 2 | 2 |
| K. Hin Stuttligi Flokkurin | 2,1 | 0 | 0 | 0 | 2,1 | 0 | 0 | 0 |
| | 100,0 | 27 | 5 | 32 | 100,0 | 27 | 18 | 45 |

Talva 3

| | Norðoyggjar | Eysturoy | N.Str. | S. Str. | Vágar | Sandoy | Suðuroy | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Í dag | 4 | 5 | 2 | 8 | 2 | 2 | 4 | 27 |
| Rættað | 3 | 6 | 2 | 10 | 2 | 1 | 3 | 27 |




























